## Øssur í Leikalund

Fríggjadagin kl. 16 letur listamaðurin, Øssur Mohr úr Fuglafirði upp eina framsýning í Leikalund í Klaksvík. Á framsýningini eru nýggir oljumálningar. Framsýningin er opin allan desembur mánað.



## Bretska húsavirðið rapar

Í Bretlandi er virðið á føstum ognum minkað ógvuliga nógv í seinastuni, og bretskir fjølmiðlar siga, at í fleiri førum er virðið á sethúsum og íbúðum fallið heili 60 prosent, síðani tað var í hæddini. Blaðið Evening Standard skrivar um eina íbúð í Plumstead, sum bleiv virðismett til 225.000 pund í oktober í fjør, og sum nú er seld fyri 95.000 pund. Í einum øðrum føri er ein íbúð í Brixton, sum kostaði 180.000 pund fyri einum ári síðani, seld fyri 79.000 pund nú. Evening Standard skrivar, at eisini í London er virðið á húsum og íbúðum fallið nógv.

# Nýbygningur heim til óvissu

**- Vit vóru í Ruslandi til onga sum helst nyttu. Úrslitið av samráðingunum vendir púrasta skeivan veg. Hetta er ein katastrofa, og eg eri púrasta sjokkeraður, sigur reiðarin, Kristian Martin Rasmussen, sum fyrst í komandi ári kemur heim úr Chili við nýbygningi fyri 240 miljónir krónur**

ÓVISSA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Seinast í januar kemur nýggja Norðborg heim úr Chili, men spurningurin er, um grundarlag er fyri skipinum, nú svartkjaftakvotan er vorðin so nógv skerd*

Seinast í januar komandi ár kemur nýggja Norðborg, sum verður smíðað í Chili, heim til Føroya. Hetta er nýbygningur hjá Kristiani Martin Rasmussen og synum í Klaksvík. Sáttmálaprísurin er 240 miljónir krónur. Sambært upprunaliga byggisáttmálanum skuldi skipið latast eigarunum 26. august í ár, men ymiskar seinkingar hava gjørt, at skipið verður latið fimm mánaðar seinni enn ætlað.

Í slíkum sáttmálum kemur byggiharrin at lata dagbøtur, tá farið verður út um sáttmálatíðina, og hetta bøtir nakað um hjá reiðarínum.

Felagið í Klaksvík hevur selt Christian í Grótinum úr flotanum, og skipið er nú statt í Panamaveitini.

Ein føroyingur er umborð, nú skipið verður siglt til nýggju eigararnar. Tað er maskinmeistarin, Esmar Muller.

### Ivasom útlit

Kristian Martin Rasmussen, sum var við í samráðingarnevndini í Ruslandi um nógv umrødda fiskiveiðisáttmálan, sigur, at stóri niðurskurðurin í svartkjaftakvotuni kemur ikki væl við hjá føroysku nótaskipunum.

- Vit vóru 12 fólk við í Ruslandi, men fyri okkum var hetta alt til onga nyttu. At síggja til, var alt avgjørt longu, áðrenn vit komu til Ruslands.

Reiðarin sigur, at tvey umboð vóru fyri Felagið Nótaskip. Tað vóru hann sjálvur og stjórin í felagnum, Jógvan Jespersen. Verksmiðjuskipini høvdu trý umboð við, reiðararnar Hanus Hansen og Mortan Johannesen og skiparan, Eyðun á Bergi.

- Vit vóru við til onga sum helst nyttu. Úrslitið vendir púrasta skeivan veg. Hetta er ein katastrofa, og eg eri púrasta sjokkeraður.

Kristian Martin Rasmussen sigur, at sjálvandi vóru teir, sum umboða verksmiðjuskipini, væl nøgdir, men tað vóru nótamenninir ikki.

- Vit vóru til reiðar at taka eina uppgerð við russar, har kvotuvirðið landanna millum verður regulerað, nú heildarkvotan av svartkjafti er so nógv skorin, men her kom eingin sum helst uppgerð.

Reiðarin vísir á, at nú royna so løgtingsmenn at fáa fiskiveiðisáttmálan við Rusland fyri uttanlandsnevndina ella løgtingið, men hann væntar ikki, at úrslitið verður broytt.

### Lutfallið broytast

Kristian Martin er sannførdur um, at hetta var rætta løtan at tikið uppgerðina við Rusland og kvotubýtið.

- Í sínari tíð bygdu sínámillum samráðingar um fiskiveiðikvotur á toskavirði, men soleiðis er ikki í dag. Virðið á ymisku fiskasløgunum broytist, og soleiðis lutfallið eisini.

Reiðarin sigur seg minnast, at tá Atli P. Dam, sáli, í 1977 gjørdi fyrsta fiskirættindarsáttmálan við Rusland, var býtislutfallið 20.000 tons av toski fyri 60.000 tons av svartkjafti.

- So stórt virðið hevði svartkjafturin tá fyri russar.

Kristian Martin sigur, at tey stívliga 40.000 tonsini, sum tey sjey føroysku nótaskipini nú eiga av svartkjafti í 2009, er minni enn tað, sum eitt nú Christian í Grótinum einsamallur hevur fiskað um árið.

- Tey 11 árini, vit hava havt skipið, hevur svartkjaftaveiðan hjá Christiani ligið millum 40.000 og 60.000 tons, og hetta hevur soleiðis verið meira enn helmingurin av grundarlagnum undir skipinum. Nú skulu hesi 40.000 tonsini, umframt kanska eitt lítið avlop frá árinum í ár, býtast millum sjey skip.

Hetta merkir, sigur reiðarin, at svartkjafturin í komandi ári bert verður viðfángur hjá hesum skipum.

### Makrelurin

Í ár hava føroysku nótaskipini fiskað 185.000 tons av svartkjafti. Enn er árið ikki liðugt, og tí er ikki vist, hvussu nógv – ella um nakað – verður eftir av kvotuni at flyta til komandi ár.

Kristian Martin ásannar, at økta makrelkvotan komandi ár fer at merkja nakað fyri nótaskipini, men ikki nær til so nógv, sum mist verður í svartkjaftinum.

- Útrokningar vísa, at nótaflotin við skerdu svartkjaftakvotuni og avtaluni við russar kemur at missa landingarvirðir fyri einar 90 miljónir krónur, samstundis sum virðið av øktu makrelkvotuni verður 16 miljónir krónur.

Hann vísir á, at netto landingarvirðið hjá nótaskipunum í komandi ári helst verður einar 73 miljónir krónur minni enn í ár, og tá er hædd eisini tikin fyri lækkaðum prísum.

- Aftrat hesum kemur so tað, sum í fyrsta lagi ídnaðarvirkið Havsbrún missir og soleiðis føroyska samfelagið annars, leggur Kristian Martin Rasmussen aftrat.

# Norðborg fiskar norðhavssild við Lofoten

**- Higartil í ár hevur skipið virkað umleið 8.000 tons av flaki og heilfrystum til matna, sigur reiðarin, Kristian Martin Rasmussen**



VIRKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nótaskipið Norðborg roynir í løtuni uppi við Lofoten, har teir fiska norðhavssild, sum verður virkað til matna.

Reiðarin, Kristian Martin Rasmussen, sigur, at fiskiskapurin seinastu dagarnar hevur verið í lagi.

- Veðrið hevur verið heldur ólagaligt, men nú roynist veðrið betri.

Hann sigur, at 24 mans eru við skipinum, og sildin verður virkað til matna.

- Hetta er tíggjundi túrurin í ár, har veiðan hjá Norðborg verður virkað til matna. Samlaða matvøruframleiðslan umborð táttar í 8.000 tons í flaki og nakað av heilfrystum.

Kristian Martin sigur, at vøran, sum virkað verður umborð á Norðborg, verður seld í ymiskum londum.

Skipari við Norðborg hendan túrin er bróðir Kristian Martin, Páll Rasmussen.

Reiðarin sigur, at Norðborg higartil í ár hevur virkað umleið 2.500 tons av svartkjafti til matna, og vøran er seld í eitt nú Nigeria, Kina og Ruslandi.